Tann føroyski Hárfríðkanarskúlin

Tann 01.09.01 taka vit 3 næmingar inn.

Krav: 9. flokkur. Tú skalt somuleiðis dáma væl at fáast við hár og smyrsl.
Tú kanst læra í eitt ella tvey ár.

1. árið fevnir um:
- fatan av tilfari, stíl, form og farvu
- reinføri
- søla & tænasta
- ergonomi
- hárvask
- høvðurbotnsmassaga
- permanent
  teori og praktik
- farva
  teori og praktik
- klipp av damum og harrum
- uppsetan av hári

Árið endar við roynd.

2. árið er framhald og fevnir um:
- vatnondullatión
- serliga klipping
- serliga uppsetan (t.d. brúðar- og veitsludám)
- brýr og vippur
- smyrsl og kunstigar negl
- piercing
- og nógvar erfaringar

Árið endar við roynd og diplom um royndin er lokin

Skriva nøkur orð um teg sjálvan og send tað til

Tann føroyski Hárfríðkanarskúlin
Niels Finsensgøta 10
110 Tórshavn

Vágs skúli

Søkt verður eftir lærarum til skúlaárið 2001/2002.

- 2 fulltíðarstørv
- 1 starv 26,5 tímar fyir lærara í farloyvi
- 1 parttíðarstarv 19 tímar

Størvini, sum eru tíðaravmarkað skúlaárið 2001/2002, verða sett sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum frá 18.1 til 27.4.

Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi 03.07.2001.

Vágs skúlanevnd
v/ Mariannu Eystberg
900 Vágur

Mála og pussa

Hví mála og pussa, tá ið tú kanst gera bæði í einari arbeisðgongd. Skalsem puss og máling. Eisini havi eg Skalflex máling á goymslu.

Nærri fæst at vita við at ringja til

Arni Samuelsen
Tlf. 455775
Klaksvík

Sosialurin fer í býin hvørja viku og tú sleppur at fylgja við hvussu hetta spælir av

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3154

Navn: Sp/f Gólvtænastan
Adressa: Skemmingsgøta 19, 100 Tórshavn

Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 14.04.2001
Viðtøkudato: 14.04.2001
Kapitalur: Kr. 118.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kr. 118.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Baldvin Tór Harðarson, Skemmingsgøta 19, 100 Tórshavn.
Stjórn: Baldvin Tór Harðarson, Skemmingsgøta 19, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum.
Grannskoðari: : Sp/f Revisión, V/ Kaj Joensen, Stoffalág 4, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 01.01.2001 - 31.12.2001
Endamál: Endamál felagsins er at reka: Handil, ídnað, gólvlegging, eiga og reka fasta ogn.
Felagið er stovnað við umskipan av virki eftir umskipanarlógini.

Skráseting Føroya tann 15. juni 2001

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3161, Sp/f Auto-Flex, 700 Klaksvík.

Viðtøkur broyttar: 23.05.2001.
Nýtt navn: Sp/f PITSTOP

Skráseting Føroya tann 13. Juni 2001

Kristin Balle

Norðurlandahúsið í Føroyum

Sí SVF tekstvarp s. 650

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3178

Navn: Sp/f SD
Adressa: Traðarvegur 19, 100 Tórshavn

Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 13.06.2001
Viðtøkudato: 13.06.2001
Kapitalur: Kr. 100.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 100.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Suni Durhuus, Traðarvegur 19, 100 Tórshavn.
Stjórn: Suni Durhuus, traðarvegur 19, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av einum stjóra.
Grannskoðari: : P/F Grannskoðaravirkið Inpact, R. C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 13.06.2001 - 31.12.2001
Endamál: Endamál felagsins er at reka íløguvirksemi og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 15. juni 2001

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. Sp/f 2816, Sp/f Munin, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar: 15.05.2001.
Nýggj hjánøvn: Sp/f Munin Gis (Sp/f Munin), Sp/f Munin Kort (Sp/f Munin), Sp/f Gis.fo (Sp/f Munin), Sp/f Kort.fo (Sp/f Munin), Sp/f Munin EFG (Sp/f Munin), Sp/f EFG.fo (Sp/f Munin) Sp/f Munin Leica (Sp/f Munin) og Sp/f Leica.fo (Sp/f Munin)

Skráseting Føroya tann 15. juni 2001

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 544, P/F Smyril-Line, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar: 15.05.2001 og 01.06.2001.
Kapitalur: Hækking við kr. 62.122.000,00 til kr. 77.634.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 62.122.000,00 til kurs 200.
Nevnd:
Farin frá sum formaður: Jónas Hallgrímsson, Seyðisfjørður.
Farin úr nevndini: Zakaris Óli Andrias Martin Hammer, Marknagilsvegur 38, 100 Tórshavn, Thomas Arabo, 415 Oyrareingir, Einar Waag, Kjalarvegur 13, 700 Klaksvík, Gunnar Heri Didriksen Mørkøre, N. Pállsgøta 17, 700 Klaksvík og Jógvan í Dávastovu, 350 Vestmanna.
Innkomin í nevndina: Tórmóður Djurhuus, Hvítanesvegur 19, 188 Hoyvík (formaður) og Heðin Klæmint Weihe, Marknagilsvegur 64, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av nevndarformanninum saman við einum stjóra ella av nevndarformanninum saman við einum øðrum nevndarlimi ella av allari nevndini.

Skráseting Føroya tann 15. juni 2001

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 1432, P/F S.D.S., 100 Tórshavn.

Nevnd:
Farin úr nevndini: Gotsia Gertrud Hjaltalin, Oman Viðarlund 9, 100 Tórshavn (formaður).
Innkomin í nevndina: Heðin Zachariassen, 435 Streymnes.

Skráseting Føroya tann 15. juni 2001

Kristin Balle

LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

Motorur til sølu
Ein Ford Fiesta 1,1 motorur til sølu. Hevur einans koyrt 36.000 km, árg. 88.
Tlf. 316005

Til sølu
4 pikadekk á felgum stødd 155x13 til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 216089

Til sølu
Ford Fiesta árg. 86 til sølu fyri 5.000 kr.
Tlf. 212322

OPEL ASCONA
Ein Opel Ascona sera biliga til sølu, evt. til deildir.
Tlf. 317524

VW POLO
koyrt ca 117.000 km, 13 ár, í góðum standi, prísuppskot 18.000 kr.
Tlf. 313877

OPEL KADETT 1.3S
árg 87, til sølu fyri 8000,00 kr. 4 pikadekk og flaguspælari fylgja við. Steinslag á forrúti.
Tlf. 448355 ella 226504

HONDA ACCORD
Ynskist sum eykalutir ella komplet baktoy.
Mobil 256860

TOYOTA LANDCRUISER
til sølu, árg. 85, nýsýnaður.
Tlf. 250133

OPEL REKORD
til sølu fyri 10.500,- kr. nýsýnaður og í góðum standi.
Tlf. 422335/225125

TOYOTA LANDCRUISER
til sølu, árg. 85, nýsýnaður.
Tlf. 250133

MAZDA 323
sedan, árg. 1/97 til sølu, koyrt 55.300 km.
Tlf. 210194

DAIHATSU CHARMANT
biliga til sølu. Krevur ábøtur. Ein fylgir við sum eykalutir.
Tlf. 218101

SUZUKI ALTO
árg. 98, koyrt 17.000 km, aut. gear, til sølu.
Tlf. 313375 ella 211641

ANHANGARI
dupult akslaður til sølu fyri 4.500,-
Tlf. 316373

DAEWOO LEGANZA 2.0 SX
árg. 5/99, 16.000 km. Bilurin er svartur og hevur 16" sportfelgur, el-rútar, sentrallás og Pioneer radio/fløguspælara.
Tlf. 243734/332031

SUMMARDEKK
Eitt nýtt summardekk við slangu 145 x 13 til sølu.
Tlf. 361253

EYKALUTIR TIL SØLU
til Toyota Carina II 1.6, árg. 88-89.
Tlf. 448614

PEUGEOT 306
2.0 XSI, gráur, st.vognur, árg. 99, til sølu.
Tlf. 320211

YNSKIST
Hevur nakar ein Mazda 323 at selja mær sum eykalutir, árg. 11.6.86.
Tlf. 447827 ella 224986

FORD SCORPIO GA87 2.8
aut. gear, sýnaður sept. 2000 til sølu fyri 5.000 kr. Bilurin koyrir ikki.
Tlf. 256399

NISSAN BLUEBIRD 1.8 GL
Typa U11, árg. 84, til sølu sum eykalutir fyri 2.000 kr.
Tlf. 332777

DIESEL BILUR TIL SØLU
Citroen Saxo, árg. 08.97, metallakk, servustýring, sentrallás, koyrir langt uppá liturin.
Ring 372292 ella 448146

TIL SØLU
16" OZ-Supertourismo v/ Michelin Exalto dekkum til Peugeot, std. 195/45 16, sera lítið slitin.
Tlf. 217747

DAIHATSU CHARADE
árg. 89, sýnaður apríl 2001, pikadekk á felgum fylgja við. Til sølu fyri 18.000 kr.
Tlf. 254670

FORD FIESTA1.1
til sølu, krevur ábøtur, hevur alufelgur við nýggjum dekkum + anhangara, gjørdur úr einum Fiesta.
Tlf. 315713 eftir kl. 17

TOYOTA COROLLA 1.6
árg. 86, til sølu fyri 7.000 kr. Sýn aður seinast nov. 2000.
Tlf. 424219

VW GOLF 1.8 GTI
árg. 85 v/ sportfelgum og vetrardekkum á felgum. Pioneer anlegg fylgir við.
Tlf. 220308

FORD MONDEO
vunnin í V4, til sølu við avsláttri.
Tlf. 253211

OPEL KADETT
Svartur Opel Kadett 1,3S, árg. 87, í besta standi til sølu. Eingin rustur og ongar buglur. Nýumvældar bremsur. Góð pikadekk á felgum og takbagasjuberari fylgja við. Prísuppskot kr. 12.000.
Ring tlf. 447870

GOLF 1.6 DIESEL
Nylakerede Golf 1.6 diesel 1986, 4 hurðar, við leðursetrum og automatgear, biliga til sølu.
Tlf. 221021 ella 253266

TOYOTA COROLLA
diesel, til sølu fyri 28.000 kr.
Tlf. 218778

DIESEL MOTORUR
til Toyota Hiace árg. 89. km. 148.000 í góðum standi til sølu.
Tlf. 213250

FORD ESCORT
diesel, árg. 91 til sølu.
Tlf. 444473

TOYOTA COROLLA
Ein Toyota Corolla 1.6 GTI, árg. 89. Hann koyrir væl og gott anlegg fylgir við.
Tlf. 213790

Arbeiði

ALT
fyrifallandi arbeiði verður gjørt av handverkara.
Tlf. 310352

TILBOÐ YNSKIST
Tilboð ynskist uppá stoypan av garði.
Tlf. 223311

TIMBURMENN!
Søkt verður eftir 8 monnum til Danmarkar at byrja skjótast gjørligt. Góð løn.
H. H. Konsult & Service
Tlf. +298 421766/ +45 51299041

Barnaansing

BØRNEPASNING SØGES I TORS
Rasmus på 1 ár søger pasning (hos dig eller os)i dagtimerne fra 1. august.Kontakt venligst Lea og Jesper Gersholm,0045-47101921 eller jesper.gersholm@skolekom.dk
tlf. 0045-47101921

Barnaútgerð

Til sølu
Svartur Simo barnavognur, brúktur til eitt barn.
Tlf. 456129

EIN HVÍTUR
»Emaljunga« koyristólur við galesju og koyriposa (ikki originalur) til sølu fyri 1.200,- kr.
Tlf. 449975

COMBIVOGNUR
Gráur leðurlook Brio combivognur til sølu fyri kr. 1.200,-
Tlf. 310183

BARNAVOGNUR
Barnavognur ynskist til keyps.
Tlf. 315275

SIMO KOMBIVOGNUR
u/lyft, sera vælhildin og 100% regntættur. Myrkabláur og við myrkabláum stelli. Ternutur posi fylgir við. Bert brúktur til eitt barn. Nýprísur 4.500 til sølu fyri 2.500.
Tlf. 445121 ella 284121

ER NAKAR
Er nakar, ið kann passa 6 ára gentu.skjótast gjørligt og fram til 15. august. Frí 2 vikur eftir ólavssøku.
Tlf. 447160/310753/211753

Bátaútgerð

7 mm lína
Vælegnað til kalvalínu v/ svøvlum. Lítið brúkt. Uml. 50 stampar seljast í smáum.
Tlf. 218540

LÍNA
7 mm lína. Vælegnað til kalvalínu v/ svøvlum. Lítið brúktUml. 50 stampar, selist eisini í smáum.
Kári Hansen

GÓÐ SNELLA
Góð hondsnella til sølu fyri 500,- ella tygum geva eitt boð.
Tlf. 252806 millum kl. 18-19

5-MANNAFAR
úr glasfipur ynskist til keyps.
Tlf. 314388

EG LEITI
eftir einum Dyno-startara til ein FM bátamotor.
Tlf. 371326

ELDRI ÁTTAMANNAFAR
10 hk Sabb v/ekkoloddi kr. 12.000. Ring millum kl. 18-19.
Tlf. 312731

YNSKIST TIL KEYPS
Lítil rasarabátur ynskist til keyps, helst hava um 50 og 100 hk.
Tlf. 317656

Bingo

DUNNUSPÆL
verður í Ranhøll í Sandvík týskvøldið kl. 19.30. Hvør full pláta kr. 300,00. Burturlutað verður millum annað 2 x 500,00 kr.
Bygdafelagið á Rananum

BINGO
verður í Felagslonini í Fuglafirði hóskvøldið 21. juni kl. 19.30.
Eldrafelagið Borgin

BÁRUBINGO
Heimabingo fæst til keyps á posthúsinum og í sølubúðum um alt landið, tú sært beinanvegin um tú hevur vunnið.
Bygdarfelagið Báran í Árnafirði

Bøkur

BØKUR TIL SØLU
Bárðarsøga ums. úr Ísl. Snjóhvíta og aðrar bøkur til sølu.
Tlf. 315255

Burturm. /funnið

Burturmist
Leðurjakki burturmistur í KÍ høllini leygarkvøldi á Norðoyastevnu, ein GSM telefon var í jakkalummanum. Veit nakar nakað um hann, so ring vinarliga á
Tlf. 452112

Svartur damujakki
Onkur hevur tikið feil við ein svartan damujakka til bryddleypið í bygdarhúsinum í Leirvík tann 09.06.01. Ein svartur jakki hongur eftir í bygdarhúsinum. Tann, sum møguligani hevur jakkan, kundi tú gjørt so væl og ringt á
Tlf. 443154 ella 212949

Roskilde festivalurin
Eitt atgongumerki til Roskilde festivalin til sølu.
Tlf. 220897-213749

OLYMPUS CAMERA
Tann, ið hevur gloymt eitt Olympus camera á samkomuni hjá Føroya Heimavirkisfelag í Kollafirði tann 27. mai, biðist ringja
tlf. 318088

VILST KETTA?
Ein vøkur spøk ketta hevur hildið til undir Fjalli í minsta lagi ein mánað. Møguliga hoyrir hon heima uppi í Hoyvík, tí hon er komin við barnagarðsbørnum, eina ferð tey vóru har uppi og vitjaðu. Kettan er hvít um búkin, ryggurin er ljósamorreyður, svartur og hvítur. Veit nakar nakað um hana, kann hann ringja
Tlf. 311214 ella 317852

LYKLATYSSI FUNNIÐ
á vegnum í Álakeri.
Tlf. 317889 ella 315065

Býli

Íbúð í KBH. (Amager)
Frá 18. juni til 28. juli er ein 2 kamars íbúð til leigu. Hevur allar hentleikar, eisini til smábørn. 10 min. frá miðbýnum. 1.000 kr. um vikuna.
Tlf. 316449

ÍBÚÐ TIL LEIGU Í HOYVÍK
Stór stova og køkur í einum, eitt kamar og baðverilsi, lítil havastova. Skriva til: Sosialurin. Box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 778

Íbúð ynskist
Friðarlig ung kvinna søknast eftir lítlari íbúð í Havn.
Tlf. 332119

Hús ynskjast
til leigu skjótast tilber úti á bygd ella í Havn.
Tlf. 254061

Kamar ynskist
Ungur drongur í bakaralæru søkir kamar í Havn skjótast gjørligt.
Tlf. 361680-252608

Århus
54 fermetrar íbúð, við stovu/kamari, køki og bað til framleigu frá 01.07.01 til 31.07.02.
Tlf. 361592

Íbúð ynskist!
Ung og friðarlig genta søkir íbúð / kamar í Havn frá 1. sep. Royki ikki.
Tlf.371043

Hús ynskjast
til keyps í Norðoyggjum (helst í Klaksvík), fyri max. 500.000 kr.
Tlf. 457095

ÍBÚÐ Í KEYPMANNAHAVN
Er tað nakar, sum eigur eina min. 2 ver. íbúð í Keypmannahavn, sum eg kann leiga frá 1/2 juli ella 1. august og framyvir.
Vinarliga ring 218015

ÍBÚÐ Í BÝTI
Tveyrúmsíbúð á Eysturbrúgv í Keypmannahavn, fæst í býti við íbúð í Tórshavn.
Tlf. 35386623

HJÁLP
Íbúð/hús ynskist til leigu skjótast gjørligt í Havn/Kollafirði.
Tlf. 251865

ÍBÚÐ YNSKIST
Friðarligt par tørvar eina íbuð ella minni hús í Fuglafirði ella har nærhendis, sum skjótast. Vit fara væl um, roykja ikki og gjalda sjálvandi rættstundis. Vinarliga Hallur og Turið
Tlf. 216197/316297

STÓR ÍBÚÐ
mitt í Keypmannahavn til leigu. Ljós, sera væl hildin, 110 fermetrar stór íbúð mitt í Keypmannahavn til leigu í vikunum 25 - 34. Íbúðin er bert 5 min. frá Ráðhúsplássinum. Kostnaður: Kr. 1.200 pr. viku.
Telefon 0045 20485358

OKKUM TØRVAR
eitthvørt at búgva í! Vit eru friðalig, fara væl um og gjalda rættstundis. Tvey vaksin og eitt barn.
Tlf. 220296/226704

HÚS ELLA ÍBÚÐ
ynskist til leigu í Havn til par við einum barni. Bæði hava fast arbeiði. Skriva til Sosialin, box 76, 110 Tórshavn
Bill. mrk. 1110

ÍBÚÐ Á FREDRIKSBERG
3 ver. íbúð til leigu í summarmánaðunum. Kostnaður 1.000 kr. pr. viku.
Tlf. 320317/254576

KAMAR YNSKIST
Ung friðarlig genta søkir kamar í Havnini. Eg fari væl um og gjaldi til tíðina.
Tlf. 443184

SUMMARHÚS
til leigu í Norðurjyllandi, góð baðistrond, 5 km til Hals, 1/2 t. til Álborg. 1 t. til Hirtshals.
Tlf. 421483

HÚS/ÍBÚÐ YNSKIST
Ungt par ynskir hús/íbúð til leigu skjótast gjørligt í Norðdepli ella Klaksvík.
Tlf. 252084 eftir kl. 16.30

RAÐHÚS Í ÁLBORG
til leigu vikunum 26 - 27 - 28 - 29.
Tlf. 0045 98 12 89 98

KEYPMANNAHAVN
Sera góð 3-verilsis íbúð (94 fermetrar) við sjógvarnar til leigu frá 1. juli - 1. august. Kr. 4.200,- fyri alt tíðarskeiðið.
Tlf. 0045 35352403

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør	❑ Amboð	❑ Arbeiði
❑ Barnaansing	❑ Barnaútgerð	❑ Bátaútgerð
❑ Bingo	❑ Brævaskifti	❑ Burturm./funnið
❑ Býli	❑ Bøkur	❑ Dansur
❑ Dýr	❑ Fundir	❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv	❑ Lutaseðlar	❑ Leikur
❑ Matur	❑ Pløgg	❑ Samband
❑ Súklur	❑ Teldur	❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp	❑ Ymiskt	❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12⁰⁰, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.

Sent hevur:

Navn:…….

Bústaður:……

Bygd/býur:……

Tlf.: ……....

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki